# <u>Skúlastýrisfundur</u>

Hósdagur 10. okt. 2024 kl. 16.30 – 18.00

**Á fundinum vóru:** Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Kristianna W. Poulsen, Margith Lamhauge, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen

**Avboð:** Gunnvør Balle

**Fundarleiðari:** Rannvá Mortansdóttir

**Skrivari:** Malan á Dul Nielsen

**Skrá:**

1. **Skúlastýrisval og uppstillingarfundur**
   Anna Maria kunnar um skúlastýrisvalið, og nær freistin er til vallistar og uppstillingarfundir. Vit skulu øll hvør í sínum lagi royna at finna onkran áhugaðan at stilla upp.

- Hvussu skulu vit skipa eitt tiltak til ein uppstillingarfund. Hvat annað kundi verið á skrá til eitt tílíkt tiltak fyri at draga fólk?
- Avgjørt er, at uppstillingarfundur við politiskum kjaki um Hoyvíkar skúla og økið rundan um, har valevnir luttaka verður 28. oktobur.

2. **Skriv frá integratiónssamskipara til hoyringar**
   Okkurt fakta um skúlan manglar í skrivinum.

3. **Uppskot frá forkvinnuni til grein/lesarabræv um Hoyvíkar skúla til umrøðu - øll hugskot og kritikkur eru vælkomin, hetta er bara eitt fyrsta útkast.**
   Sum heild var semja um, at greinin var góð og góðkend. Onkrar smávegis broytingar og tillagingar eru gjørdar.

**4. Einglar og endurskin**

Vit skulu standa við portrið um morgunin og býta endurskin út. Avgjørt er, at hetta verður hósdagin, 24. oktobur áðrenn skúlatíð.